# Almannamálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 3. december 2020 |
| Mál nr.: | 20/00889 |
| Málsviðgjørt: | JAK |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## húsaleigu og felags útreiðslur, skilhald o.a.

Við heimild í § 48, stk. 4 í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 verður ásett:

*Virkisøki*

**§ 1.** Henda kunngerð fevnir um persón í fyribils bústaði sbrt. § 45 í løgtingslógini ella vardum bústaði sbrt. § 46 í løgtingslógini.

*Allýsingar*

**§ 2.** Í hesi kunngerð er at skilja við:
1) Bústaður: Ein ella fleiri bústaðir, skipaðir sum fyribils bústaðir sbrt. § 45 í løgtingslógini ella sum vardir bústaðir sbrt. § 46 í løgtingslógini.
2) Persónur: Persónur, ið býr á bústaðnum, ella annar, ið hevur heimild at virka vegna hendan persónin.
3) Myndugleikin: Almannaverkið ella annar veitari av bústaðartilboði sbrt. § 66 í løgtingslógini.

*Sáttmáli*

**§ 3.** Áðrenn persónur flytur inn í bústaðin, verður leigusáttmáli gjørdur millum persónin og myndugleikan.
*Stk. 2.* Leigumál sbrt. hesi kunngerð eru ikki fevnd av løgtingslóg um útleigan av bústøðum.

*Gjald fyri bústað*

**§ 4.** Persónur rindar fyri húsaleigu og harafturat til:
1) útreiðslur fyri streym og hita í bústaðnum,
2) felags útreiðslur í bústaðnum, og
3) endurnýggjan av felags innbúgvi í bústaðnum.
*Stk. 2.* Foreldur ella verjar rinda eitt ávíst gjald fyri persón, ið er yngri enn 18 ár.

*Húsaleiga*

**§ 5.** Húsaleigan fevnir um leigu av egnum hølum og felagshølum. Húsaleigan fevnir ikki um starvsfólkahølir e.l.
*Stk. 2.* Húsaleigan verður ásett eftir fermetratalinum og aldrinum á leigaðu hølunum. Almannaverkið ger eina stigaskipan fyri húsaleigu, sum landsstýrismaðurin góðkennir.

**§ 6.** Húsaleiga sbrt. § 5 kann setast niður:
1) tá persónur gerst fólkapensjonistur, ella
2) tá persónur hevur uppihaldsskyldu mótvegis børnum, yngri enn 18 ár.
*Stk. 2.* Fólkapensjonistur rindar í mesta lagi tað sama, sum fólkapensjonistur rindar fyri búpláss á kommunalum ellis- og røktarheimi.

**§ 7.** Húsaleigan verður javnað á hvørjum ári sbrt. løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.

*Felags útreiðslur*

**§ 8.** Persónur rindar til felags útreiðslur hjá teimum, ið búgva á bústaðnum.
*Stk. 2.* Inngjaldið verður í felag ásett av teimum, ið búgva á bústaðnum, og leiðsluni á bústaðnum.
*Stk. 3.* Felagskassin verður gjørdur upp 4 ferðir um árið.
*Stk. 3.* Tá persónur flytur úr bústaðnum, verður gjørt endaliga upp.

*Endurnýggjan av felags innbúgvi*

**§ 9.** Persónur rindar til endurnýggjan av felags innbúgvi á bústaðnum.
*Stk. 2.* Inngjaldið verður í felag ásett av persónunum, ið búgva á bústaðnum, og leiðsluni á bústaðnum.
*Stk. 3.* Inngjaldið til endurnýggjan av felags innbúgvi fer á eina uppsparingarkontu.

*Streymur og hiti*

**§ 10.** Persónur rindar til útreiðslur fyri ljós og hita á bústaðnum. Inngjaldið verður ásett av myndugleikanum eftir felags nýtsluni á bústaðnum.

*Reglugerð*

**§ 11.** Myndugleikin kann í reglugerð áseta reglur um:
1) Skilhald á bústaðnum,
2) nýtslu av rúsdrekka og rúsevnum á bústaðnum,
3) inngjald til felags útreiðslur á bústaðnum, og
4) inngjald til endurnýggjan av felags innbúgvi á bústaðnum.
*Stk. 2.* Reglugerðin verður endurskoðað á hvørjum ári.

*Gildiskoma*

**§ 12.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2021.

Almannamálaráðið, 3. december 2020.

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen